# Skála vildi ikki sleppa bronsuni

**Heimaliðið á Mølini megnaði ikki at hótta gestirnar av Skála, sum í einki serliga sannførandi uppgerð vóru væl stinnari í fótbóltsspælinum**



*Tað gjørdist ikki til gull, men ein bronsa er eisini verd at feira, og fyri hana fekk Johan Nielsen ein lufttúr eftir seinasta dystin á árinum*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

EB/STREYMUR-SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Um talan fer at gerast um klassikara, fer bara tíðin at vísa. Tá ið Skála vitjaði á Eiði, bóru karmarnir boð um toppuppgerð. Tað man vera sjáldan, at tað hava verið so nógvir áskoðarar á Mølini, sum tað vóru leygardagin. Viðhaldsfólkini hjá bæði EB/Streymi og Skála vónaðu og roknaðu við møguleikanum at teirra skuldu vinna fyrstu heiðursmerkini nakrantíð.

Tað vóru gestirnir, sum vóru fegnast eftir tvær ferðir trý korter. Skála vann 1-0. Málið skoraði landsliðsspælarin Jónhard Frederiksberg, tá ið ein stórur hálvur tími var farin. Málið kom eftir besta álopið í allari uppgerðini. Á egnari hálvu spældi Skála úr høgru og tvørtur um til Alexandur Johansen, sum legði aftur til Iulian Florescu. Hann sendi djúpa diagonalsending í høgra borð, har Bogi Gregersen gjørdist leysur, lyfti upp um málverjan og mitt innfyri málið, har Jónhard Frederiksberg úr stuttari fjarstøðu setti krúllin undir bóltin.

So var 1-0 til Skála. Harvið skuldi heimaliðið gera tvey mál, áðrenn bronsuplássið kundi gerast veruleiki. Mótbrekkan var tung, og EB/Streymur megnaði ongantíð at hótta Skálaliðið. Seinna partin av seinna umfarinum royndi heimaliðið at leggja trýst á, men tað eydnaðist bara lutvíst. Næst við at fáa mál vóru teir, tá ið skotroynd eftir horna úr høgru varð bjargað á strikuni.

Talan var um ikki serliga væl leikta uppgerð. Heimaliðið tóktist hava viljan at royna, men teir megnaðu ikki at finna eyka girið, sum skuldi til, um tað skuldi eydnast. Miðvøllurin fekk ongantíð rættuligt tak á spælinum. Oftast vóru tað skálamenn, sum vunnu nærdystirnar og vóru fyrstir á returbóltunum, og Sonni L. Petersen og Sorin Anghel, sum tóktist darvaður av skaðanum, sum hann fekk á Toftum, vóru ongantíð vandamiklir. Besta møguleikan í 1. hálvleiki fekk miðvallarin í høgru, Bárður Olsen, dygst undan steðginum. Møguleikin stóðst eftir kiks í miðverjuni, men skotið úr seytjan metrum fór langt upp um málið.

### Disilpineraðir skálamenn

Skálaliðið var eitt sindur meiri verjukent í uppstilling, enn tað hevur verið flestu ferðirnar fyrr í ár. Jónhard Frederiksberg var einsamallur á toppinum. Hann var skjótur og ágangandi, og hann megnaði at binda Pacek og tveir afturat, og teir høvdu stórar trupulleikar av skjóta manninum. Miðvøllurin hjá Skála var sera tættur. Tað er framúr styrkur, at liðformaðurin, Pauli G. Hansen, er komin fyri seg aftur. Hann er sera skilagóður í uppspælinum, og hann hevur uppaftur størri virði í verjupartinum.

Johan Nielsen hevði valt at hava Paula G. Hansen sum eyka verjukendan miðvallara. Nenad Stankovic og Bárður Danielsen vóru sentralir frammanfyri hann, og tá ið mótstøðumenninir royndu at byggja upp, duttu miðvallararnir í borðunum - Bogi Gregersen og Alexandur Johansen - eitt sindur longri inn á vøllin. Felags fyri teir allar var, at teir støðugt arbeiddu sum hestar. Iulian Florescu plagar at vera rættuliga framrættaður vongverji í vinstru. Hesa ferð helt hann seg so at siga bara í verjustøðuni.

Tveir minuttir eftir, at hann hevði lagt Skála framum, átti Jónhard Frederiksberg at havt staðfest Skála sigurin. Pauli G. Hansen spældi hann leysan eitt sindur til høgru. Gunnar á Steig kendi seg noyddan at leypa út úr málinum, og tá ið Jónhard royndi at lyfta upp um málverjan, fór bólturin dygst skeivu megin stólpan.

Í roynd at tippa fyri landsliðsmanninum hjá Skála og ivaleyst eisini tí, at teirra maður ikki var heilt væl fyri, flutti EB/Streymur miðskeiðis í 2. hálvleiki Sorin Anghel úr álopinum og aftur í miðverjuna. Pacek fór fyrst á vongverjan í vinstru, og síðstu løtuna varð hann settur í álopið í vón um, at tað kanska skuldi eydnast at fáa málið, ið skuldi birta eyka íblástur til síðstu løtuna at stríðast fyri sigursmálinum, ið var alneyðugt fyri at fáa fatur á bronsukrónunum.

Men tað eydnaðist ikki. Skála helt tørn um leiðslumálið, teir høvdu fingið í 1. hálvleiki. Heimamenninir fokuseraðu ov nógv uppá at ilskast inn á mótstøðumenninar, sum sjálvandi høvdu hug at draga tíðina út. Kanska hevði trýstið verið eitt sindur tyngri, um teir høvdu fokuserað meiri upp á sítt egna spæl.

Skála vann 1-0, og harvið megnaðu teir at spæla øll átjan umførini uttan at verða troðkaðir av heiðursmerkjaplássunum.



*Rómurin var øgilugur á Skálamonnum. Fyri fyrst ferð í søguni hava teir vunnið heiðursmerki í bestu deildini*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**EB/Str.-Skála 0-1 (0-1)**
0-1: Jónhard Frederiksberg 32.
**Dómari:** Lassin Isaksen

**EB/Streymur:**
Gunnar á Steig - Gert Hansen, Andrzej Pacek, Fróði Clementsen (Arnbjørn T. Hansen, 61., Esmar Eiðisgarð (Knút Vesturtún, 46.) - Bárður Olsen, Marni Djurhuus, Jákup Martin Joensen (Ólavur Poulsen, 77.), Hans Pauli Samuelsen - Sorin Anghel, Sonni L. Petersen
**Gult kort:** Eingin

**Skála:**
Igor Bjarni Kostic - Eugen Stanciu, Dusan Jaic, Rúni Rasmussen, Iulian Florescu - Bogi Gregersen (Hanus Thorleifsson, 79.), Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Bárður Danielsen, Alexandur Johansen - Jónhard Frederiksberg (Teitur Joensen, 86.)
**Gult kort:**
Iulian Florescu,
Igor Bjarni Kostic

# Tveir fáa ikki boð aftur

**Skálamenn arbeiða við at fáa tríggjar av útlendsku spælarunum at halda fram eitt ár afturat, meðan tveir nevyan verða bidnir aftur**

SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Eftir at teir tvær tær fyrstu ferðirnar við neyð og deyð megnaðu at lyfta seg burtur frá niðurflytingini, hevur tað verið heilt øðrvísi á Skála í ár. Hóast tað hevur gingið eitt sindur striltið eftir summarsteðgin, tá ið fleiri spælarar hava verið skaddir, og aðrir hava havt fleiri leikbann, so eydnaðist tað leygardagin at vinna fyrstu heiðurskrónurnar nakrantíð.

Johan Nielsen hevur verið venjari, og hóast eingin sáttmáli er undirskrivaður, so skilst tað, at ætlanin er, at samstarvið skal halda fram.

Skála hevur havt fimm útlendingar at hjálpa sær. Tað verður roknað við og vónað, at tríggir teirra fara at halda fram, meðan tveir teirra ikki fáa boð aftur. Teir, sum teir á Skála fegnir vilja hava at halda fram, eru verjuspælararnir Dusan Jaic og Iluian Florescu og miðvallarin Nenad Stankovic. Teir, sum neyvan fáa møguleikan at halda fram, eru málverjin Igor Bjarni Kostic og Eugen Stanciu. Hesin seinni varð ætlaður at vera álopsspælari, men í gjár var hann vongverji í høgru.

## Arnhold Berg á landsliðið

Skálamaðurin Arnhold Berg er úttikin til landsliðið, sum næstu dagarnar skal spæla ímóti ávíkavist Kypros og Írlandi. Arnhold er úttikin fyri Johan Byrial Hansen, sum av arbeiðsorsøkum hevur verið noyddur til at melda avboð. Arnhold Berg er ungur verjuleikari, ið hevur havt eitt gott kappingarár hjá Skála. Hetta er fyrstu ferð, at Arnhold er við í A-landsliðshøpi.

*tn*



# Mistøk kostaðu

**VB vann fult uppibornan 4-2 sigur á GÍ í Gøtu leygardagin, tá ið heimaliðið royndi seg við heilt nýggjari verju og nýggjum málverja**

GÍ-VB
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Leikandi venjarin hjá GÍ, Krystof Popczynski, var alt annað enn nøgdur við dystin móti vágbingum leygardagin, sum hann kallaði ringasta dystin hjá GÍ í ár*

*Savnsmynd*

Vágbingar gjørdu bart, tá ið teir leygardagin vóru á vitjan í Serpigerði í Gøtu. Gøtumenn vóru nógv skerdir undan dystinum, og undir upphitingini gjørdist tað greitt, at heldur ikki málverjin, Hallur Jacobsen, bleiv klárur til dystin, og tískil noyddist eykamálverjin, Rúni Joensen, millum stengurnar at standa.

### Símun í essinum

Dysturin var ikki serliga gamal, tá ið vágbingar vístu heimaliðnum, at teir ætlaðu sær øll trý stigini. Ein sera væl upplagdur Símun Samuelsen fær hendur á bóltinum úti í øðrum borðinum og sær, at Rúni í GÍ-málinum stendur nakað væl burtur frá sjálvum málinum. Símun ger tí bart og úr eini 40 metra fjarstøðu langar hann til, og bólturin fer upp um Rúna og í netið til 1-0. Tá vóru ikki meiri enn sjey minuttir leiktir.

Longu minuttin eftir vóru vágbingar aftur upp á spæl, tá ið rangstøðufellan hjá GÍ miseydnast. Símun Samuelsen sleppur at renna púra einsamallur móti málinum hjá gøtumonnum, og hann var tryggur og skoraði til 2-0 móti sínum gomlu liðfeløgum.

Hetta var vorðið sum byrjan hjá VB, og unga verjan hjá GÍ hevði als ikki fingið høvi til at finna sær til rættis, áðrenn vágbingar høvdu revsað teirra mistøk.

Gøtumenn komu tó eitt sindur meiri við í dystin, so hvørt sum hálvleikurin leið, og Hans Pauli Petersen fekk minkað um munin til 1-2 eftir trunkaspæl framman fyri Bjarna Johansen í málinum hjá VB.

Gleðin var tó stokkut hjá heimaliðnum, tí vágbingar vóru grammari og dugdu betur at brúka nógv vindin, sum var í Gøtu leygardagin.

### Ungt stjørnuskot

Enn einaferð var tað eitt persónligt mistak hjá GÍ, sum kostaði, tá ið VB legði seg á odda 3-1. Leikandi venjarin hjá gøtumonnum, Krystof Popczynski, hevði bóltin í egnum brotsteigi, men misti hann til altíð vandamikla Milan Kuljic, og endin var, at 16 ára gamli Jón K. Poulsen, sum hesaferð var við frá byrjan í álopinum hjá vágbingum, kundi økja um leiðsluna hjá VB til 3-1, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Tað sást á øllum brøgdum, at verjan hjá GÍ ikki var samanspæld, og vágbingar dugdu eisini at gera sær dælt av hesum. Í seinna hálvleiki var ungi Jón K. Poulsen enn einaferð upp á spæla, og hann legði VB á odda 4-1. Landsliðsleikarin Súni Olsen fekk við sínum 12 máli í hesum kappingarárinum minkað um munin til 2-4, men veruligur spenningur kom ongantíð í dystin, tí til tað var munurin á liðunum báðum ov stórur.

Vágbingar vóru sum vera man stak væl nøgdir við avrikið í Gøtu leygardagin, og tað er vert at nevna, at VB ongan leikara hevði á beinkinum, tí tann eini eykaleikarin, ið skuldi við til Gøtu, hevði forsovið seg til bátin leygarmorgunin.

**FAKTA**

**GÍ-VB 2-4(1-3)**
0-1 Símun Samuelsen
0-2 Símun Samuelsen
1-2 Hans Pauli Petersen
1-3 Jón K. Poulsen
1-4 Jón K. Poulsen
2-4 Súni Olsen
**GÍ:** Rúni Joensen - Jónreid Dalheim(Poul A. Jacobsen 64.), Sam Jacobsen, Kaj Ennigarð, Poul Henning Jacobsen - Áslakkur Petersen, Símun Louis Jacobsen(Poul Arni Jacobsen 70.), Krystof Popczynski, Hans Pauli Petersen(Poul Rói Poulsen 74.) - Súni Olsen, Adam Paulucek
**VB:** Bjarni Johansen - Eyðstein í Lágabø, Eyðun Jacobsen, Poul N. Poulsen, Kári í Lágabø - John Eystberg, Jón Pauli Olsen, Milan Kuljic, Símun Samuelsen - Dan Djurhuus, Jón K. Poulsen
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**Gul kort:** Poul Arni Jacobsen, Kaj Ennigarð, Poul Henning Jacobsen - Jón Pauli Olsen

# Ringasti dystur í ár

**Leikandi venjarin hjá GÍ, Krystof Popczynski, var stak illa nøgdur við avrikið leygardagin, og hann kallaði dystin fyri ringasta dyst hjá GÍ í ár**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Krystof var als ikki nøgdur við dystin leygardagin. – Vit gera alt ov nógv mistøk, sum verða revsaði av VB. Minst trý av teimum fýra málunum, sum VB fær, fáa teir, tí at vit gera persónlig mistøk, sigur Krystof.

### Nýggj verja

Leikandi venjarin sigur, at nýggja verjan hjá gøtumonnum ikki fekk eitt bein til jørðina, tí at vágbingar vóru klárir frá fyrsta bríksli. – Tað var nógvur vindur leygardagin, men tað var líka fyri báðar partar, so tað kann ikki nýtast sum umbering, sigur Krystof.

Pólverjin vísir á, at fleiri av monnunum í verjuni vóru blaðungir, og millum annað leikti Sam Jacobsen sín fyrsta dyst á besta liðnum hjá GÍ.

Krystof Popczynski verður verandi í Gøtu komandi kappingarár, og hann sigur, at í vetur ætlar hann sær at verða verandi í Føroyum, og ikki fara til Pólands, sum annars hevur verið vanligt, meðan hann hevur verið í Føroyum. – Eg ætli mær, at vit skulu fara undir at venja aftur longu um einar tríggjar vikur, so at vit verða betur fyri komandi kappingarár, sigur leikandi venjarin hjá GÍ.

Pólverjin heldur, at tað er neyðugt hjá GÍ at fáa ein nýggjan málverja til komandi kappingarár, tí at Hallur Jacobsen fer til Danmarkar. Hann sigur somuleiðis, at tað er alneyðugt, at GÍ ikki missir nakað fólk í vetur, tí hópurin er sera lítil sum er, sigur Popczynski. – Um vit skulu standa okkum betur komandi ár, er eisini neyðugt, at vit fáa einar tveir ella tríggjar heilt sterkar nýggjar leikarar, tí annars hava vit ikki nóg breiðan hóp, heldur Krystof Popczynski.

# Vit stóðu væl

**Málverjin hjá VB, Bjarni Johansen, helt tað verða fult uppiborið, at vágbingar vunnu í Gøtu leygardagin**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bjarni Johansen hevur í nógv ár staðið millum stengurnar hjá VB, men sjáldan hevur hann fingið so lítla mótstøðu í Gøtu sum leygardagin.

### Tætt millum keturnar

– Eg haldi, at vit spældu ein fínan dyst leygardagin. Teir tóktust heldur ikki verða serliga væl fyri, og tað vóru nógvir ungir spælarar á liðnum hjá teimum, men tað var tað eisini hjá okkum, sigur hann.

Bjarni Johansen sigur, at eftir hansara tykki var VB-liðið sera væl skipað leygardagin, og teir stóðu sera væl á vøllinum. Somuleiðis heldur royndi málverjin hjá vágbingum, at gøtumenn als ikki fingu nakað pláss at spæla á, tí at so tætt var millum keturnar hjá VB, og tað hóvaði ikki gøtumonnnum.

Bjarni Johansen letur eisini væl at 16 ára gamla Jón K. Poulsen, sum leygardagin taldist millum teir fyrstu ellivu hjá VB, og ungi maðurin gjørdi ikki mætari enn at skora tvær ferðir!